# TILTØK

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 17. mai***
Vit lurta eftir Marin Norðbø jarðamóðrini á Sandi, tá hon sigur frá. Hetta er ein upptøka, ið útvarpið sendi í 1965.
***Mikudagin 19. mai***
Vit spæla Boccia. Vit byrja kl. 14 í Virkinum við løttum fimleiki og spæla síðani í liðunum reyða og bláa.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 1*5-18.
***Mánadagin 17. mai***
Fimleikur við Jóhannu Troest
***Týsdagin 18. mai***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 19. mai***
Undirvísing í Boccia v/ Jóhan Danielsen
***Hósdagin 20. mai***
Kristi Himmalferðardagur – stongt
***Fríggjadagin 21. mai***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo
og t-post adressu:
javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237.
www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597,
fartlf. 222381,
skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr.: deaf_deaf.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839
faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16-18. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

**LISA -**
*Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu*
Tlf: 320197
Teldupostur: lisa@lisa.fo
Heimasíða www.lisa.fo
Opið: mánad. - fríggjad. kl. 9-12, tó týsd. kl. 16.30 - 20.30.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur:
lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919,
hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210,
gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832,
trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883,
kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 22. mai kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Páll á Reynatúgvu, Sand og Kristina Johannesen, Sand. Borðhald fyri innbodnum verður kl. 20.00 í Virkinum á Sandi.

Leygardagin 5. juni kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Sonja Sólbjørg, Klaksvík og Jonhard Danielsen, Søldarfjørður. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. mai á tlf. 442099, 441199 ella 455438.

Leygardagin 26. juni giftast Laila Haraldsen, Argir og Sámal av Reyni, Tórshavn. Vígslan verður í Ebenezer kl. 14.00. Veitslan verðu rhildin kl. 18.00 í Reyni Service, Vegurin Langi, Hoyvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 315829 ella 317899 ella senda ein teldupost til laila.haraldsen@kallnet.fo ella samal_reyni@yahoo.dk áðrenn 5. juni.

Leygardagin 26. juni kl. 16.00 giftast Thora Petersen og Búi Holm í Bíggjar kirkju. Brúdleypið verður hildið í Norðradali kl. 19.00. Tey,ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 228742 ella 580832 innan 6. juni.

26. juni kl. 16.00 giftast í Skopunar kirkju Annika Ryggstein og Remi Nicolajsen. Vælkomst verður í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá innan 12. juni á tlf. 361955, 361047 ella 361779.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Gudny Johannesen og Rodmund Magnussen á Signabø. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 421489, 421449 ella 421569.

Í samband við okkara brúdleyp og 50 ára føðingardag hjá Karl tann 29. juni, hevði tað glett okkum at sæð familju og vinir til døgurða í Sinding forsamlingshúsi fríggjadagin tann 2. juli kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juni á tlf. 0045 97136669.

10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 255263 ella 320391 eftir kl. 19.00. Seinasta freist at tekna seg er 15. juni.

## SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 19. mai hava hjúnini Hervør og Poul Jacob Joensen í Klaksvík silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

23. juni hava Súsanna og Hjørleiv Hammer, Reynsgøta 25, Argir, verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitsla verður hildin á Hotel Føroyum 26. juni kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 317645 ella 361325 áðrenn 14. juni.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu,verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.



# Royalur dagur í Kurlu



Dagstovnurin Kurla helt stóra brúdleypsdagin við manér. Onkur av børnunum høvdu latið seg í. Og matskráin hendan dagin var heilt annaðleiðis enn vanligt.

Tey smærru børnini skuldu út at grilla, og tey størri fingu mat frá Burger King.

– Hetta er jú eitt ævintýr fyri børnini, sigur leiðarin Durita Dam.

Starvsfólkini hava fyrireikað hendan dagin væl, og børnini hava eisini tikið lut í fyrireikingunum. Tey hava teknað fløgg. Bæði tað danska, føroyska, grønlendska og tað avstralska. Eisini fingu tey prinsessu og kongakøku hendan dagin.

Durita heldur fyri, at tað so sanniliga ikki er á hvørjum degi, at tann komandi kongurin í ríkinum verður giftur, so tað er so líka til at gera burturúr.

**- sae -**

# Oys, tey eru fitt

**– Tey eru so óalmindiliga fitt, bæði, sigur 87 ára gamla Fía úr Hvannasundi, sum fylgdi brúðarparinum allan dagin í sjónvarpinum**

BRÚDLEYP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fyri meira enn hálvum ári síðani kunngjørdi danska kongahúsið, at Hansara Hátign Fríðrikur krúnprinsur og Mary Elisabeth Donaldson skuldu giftast tann 14. mai 2004.

Tá segði 87 ára gamla Fía í Hvannasundi, at hon so ikki fór at gera døgurða tann dagin, tí tá skuldi hon hyggja at sjónvarpinum.

Fía hevur altíð verið sera áhugað í danska kongaríkinum. Hon heldur Billedbladet, tí har ber væl til at fylgja við teimum kongaligu.



*87 ára gamla Fía úr Hvannasundi sat og fylgdi við allan dagin, tá kongaliga brúdleypið stóð*
*Mynd: Jens K. Vang*

– Tey bæði eru so einastandandi fitt. Hann er so menniskjasligur, og hon er sera djørv, tað má eg siga, heldur Fía fyri, meðan sjónvarpið hoyrist í bakgrundini.

Fía sigur eisini, at hon hámetur tey fyri at halda alt strevið út hesa seinastu vikuna.

– Tey hava havt eitt tógvið strev hesa vikuna, og eg má siga, at tað er ótrúligt, at tey hava hildið hetta út, heldur Fía.

### Góður kongur

Fía heldur nógv av Fríðriki og Mary. Tað hoyrist á henni, meðan hon tosar um tey. Hon heldur, at Mary fer at verða ein góð prinsessa og seinni drotning. Tað er hon ikki í iva um.

– Å, nú eru tey bæði á skíggjanum, sært tú, sigur hon mitt í tí heila.

Hon byrjar at tosa um, hvat fyri eginleikar Fríðrikur hevur. Hóast hon ongantíð hevur hitt hann, so tosar hon um hann, sum um hon hevur kent hann alt lívið.

– Hann er so menniskjasligur og fittur. Júst sum eitt vanligt fólk, sigur Fía og leggur afturat, at um ein hyggur at Joakim prinsi, so er hann kanska meiri kongaligur í sínum atburði og framferðarhátti enn bróðurin.

– Ikki tí, hann er eisni stak fittur, sigur hon. Og heldur hon, at nevniliga tað, at Fríðrikur er so menniskjasligur fer at gera, at hann verður ein sera góður kongur.

Fía hugdi at brúdleypinum saman við systur sínari, og sótu tær allan dagin og fylgdu við.

# Kirkjukonsert á Glyvrum

**Sunnukvøldið verður fjølbroytt og áhugaverd kirkjukonsert á Glyvrum við kórsangi, solosangi, floytu- og orgulspæli**

KIRKJUKONSERT

Komandi sunnukvøld klokkan 20.00 verður fjøllbroytt og áhugaverd kirkjukonsert í Glyvra kirkju.

Kór Glyvra kirkju leggur fyri við at syngja nakrar av okkara kendu fosturlandssangum. Fríðhild Hansen, Bodil Simonsen og Katja Volovelskaja fara at spæla á floytu, og sopranarnar Marita Joensen og Jonni Dahl Hansen fara at framføra "Pie Jesu" av Gabriel Fauré og "Bist du bei mir" eftir Johann Sebastian Bach.

Frobenius-orglið í kirkjuni sleppur eisini upp í part. Spældar verða tvær orgulkoralir eftir Buxtehude og Jesper Madsen.



*Tað er Meinhard Bjartalíð, prestur, ið stjórnar Kór Glyvra Kirkju, sum sunnukvøldið fer at hava fjørlbroytta konsert í Glyvra Kirkju*

Kvinnukór Glyvra kirkju fer síðani at syngja tveir yndisligar sangir av T. N. Djurhuus við løgum hjá Schulz.

Kór Glyvra kirkju endar konsertina við at framføra eitt nú "Kyrie" eftir miðaldar tónaskaldinum Orlando di Lasso og undurføgru motettina "Locus iste", sum Anton Bruckner komponeraði í 1869.

Kór Glyvra kirkju telur 25 sangarar og verður stjórnað av Meinhardi Bjartalíð.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 15.05. kl. 21[15]
Leygardagin 15.05. kl. 23[30]
Sunnudagin 16.05. kl. 22[30]




Leygardagin 15.05. kl. 18[30]
Sunnudagin 16.05. kl. 19[45]




Leygardagin 15.05. kl. 23[00]
Sunnudagin 16.05. kl. 22[00]




Leygardagin 15.05. kl. 20[45]
Sunnudagin 16.05. kl. 19[30]

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning –**
**Billettprísur: 80,- kr. –**
**Forsølan er byrjað**
Mikudagin 19.05. kl. 19[00]
Mikudagin 19.05. kl. 22[30]




**Heimsfrumsýning –**
**Forsølan er byrjað**
Fríggjadagin 28.05. kl. 20[15]
Fríggjadagin 28.05. kl. 23[00]

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**